# Hetta er mín jólasangur




*- Eg kann ikki ímynda mær jól uttan jólasangirnar, dansanina um jólatrææið, jólaevangeliið og ikki minst børnini, sum seta húsið á annan endan, tí tey eru so spent, sigur Tórvild Østerø úr Skálafirði*

## Tórvild Østerø:

*Merry Christmas Everyone*

- Eg má viðganga, at eg eri ein ordans jólanissa, sum elskar alt, sum hevur við jól at gera, sigur Tórvild Østerø úr Skálafirði.

Eg haldi at tað besta við jólum er, at øll vilja gera sítt til at skapa tann serliga friðin og hugnan, tá jólini koma.

Jólagávurnar eru ok, so leingi tær ikki kosta ov nógv. Tað er tankin, sum telur. Bara tað at fólk seta sær tíð av at fara út og keypa tær okkurt småting, tað er faktiskt nokk í sær sjálvum.

Eg kann ikki ímynda mær jól uttan jólasangirnar, dansanina um jólatræið, jólaevangeliið og ikki minst børnini, sum seta húsið á annan endan, tí tey eru so spent.

Eg elski at fara ein gongutúr ígjøgnum býin, tætt uppundir jólaaftan, serliga um tað kavar, og tað ikki er so lætt at sleppa av við bilar í býnum. Tað fær fólkið út at ganga.

Tað er so hugnaligt at síggja hvussu býurin er pyntaður, og síggja hvussu fólk rokast; tey keypa tær síðstu jólagávurnar, og tann góða matin, sum man etur um jólini. Øll hava so nógv, sum skal náast, men tey eru tó í góðum lag allíkavæl.

- Sangurin " Merry Christmas Everyone" fær meg altíð at minnast á rokanina til jólar, og tá livi eg mitt í verðini, sigur Tórvild Østerø.

*Merry Christmas Everyone*

*Snow is fallin, all around me*
*Children playing, having fun*
*Its the season, love and understanding*
*Merry christmas everyone*

*Time for partys, celebrations*
*People dancing, all night long*
*Time for presents, and exchanging kisss*
*Time for singing, christmas songs*

*Were gonna have a party tonight*
*Im gonna find that girl*
*Underneath the mistletoe,well kiss by candle light*

*Room is swaying, records playing*
*All the songs, we love to hear*
*All I wish that everyday was christmas*
*What a nice way to spend the year*

*Were gonna have a party tonight*
*Im gonna find that girl*
*Underneath the mistletoe,well kiss by candle light*

*Snow is fallin, all around me*
*Children playing, having fun*
*Its the season, love and understanding*
*Merry christmas everyone*
*Merry christmas everyone*
*Oah merry cristmas everyone*

*Snow is fallin, all around me*
*Children playing, having fun*
*Its the season, love and understanding*
*Merry christmas everyone*

*Snow is fallin, all around me*
*Children playing, having fun*
*Its the season, love and understanding*
*Merry christmas everyone*

*Snow is fallin, all around me*
*Children playing, having fun*
*Its the season, love and understanding*
*Merry christmas everyone*
*Merry christmas everyone*
*Merry christmas everyone*

# Nakað til eyguni

**Optikbúðin í Bøgøtu er ein fyritøka, ið hevur spesialiserað seg í øllum sum hevur við eygu og sjón at gera**




Síðan 1988 hevur Optikbúðin hildið til í Bøgøtu í Havn. Poul Einar Kruse varð útbúgvin sjóntøkningur í 1987, og árið eftir stovnaði hann Optikbúðina. Eftir at hava hildið til í Bøgøtu 2 og seinni í Bøgøtu 4 flutti Optikbúðin í nýggjan handilsbygning í Bøgøtu 5 í 2006, har sjálvur handilin er í niðastu hædd og í miðhæddini eru m.a. kanningarrúm, verkstaður og skrivstova.

Handilshølini eru í modernaðum stíli, við øllum sum hevur við eygu og sjón at gera sum t.d. brillur og kontaktlinsur við tilhoyri, kikarar og luppar.

Í Optikbúðini arbeiða fimm fólk, har av tveir optikarar: Poul Einar Kruse og Regin Thomsen. Regin tók sína útbúgving sum sjóntøkningur í 2008.

Tað hevur stóran týdning at fáa eyguni kannaði fyri at fáa tær heilt røttu brillurnar ella linsurnar, ið passa til eyguni. Optikbúðin hevur kanningarrúm við bestu útgerð til at kanna eyguni. Sjónin broytist við tíðini hjá teimum flestu, og tí er tað eitt gott hugskot at fáa eyguni kannaði við jøvnum millumbili, siga Regin Thomsen og Poul Einar Kruse.

Optikbúðin hevur eisini nógv góð gávuhugskot til jóla.

